# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Obama velur latinokvinnu í Hægstarætt

Amerikanski forsetin Barack Obama hevur enn einaferð tikin heimin á bóli, í hvussu so er amerikanska fólkið við at velja eina liberala latinoamerikanska kvinnu í Hægstarætt. Valið verður sera væl móttikið av stórum pørtum av amerikanskari pressu og sum heild av teimum mongu, sum hava stuðlað Obama og demokratiska flokkinum. Ja øllum teimum, sum standa fyri einum meira opnum og minni fundamentalistiskum samfelag. Valið av Sonja Sotomayor sum nýggjan dómara í Hægstarætti verður mett sum enn eitt tekin um politikkin hjá tí liberala og frísinnaða Obama, sum við hesum vali ynskir at vísa tí vanliga amerikanaranum, at tað skal vera pláss fyri bæði kvinnum og fyri dómarum við liberalum og humanum menniskjasýni í hesum mest týðandi stovni í USA.

Høgravongurin í amerikonskum politikki hevur longu mótmælt avgerðini hjá Obama við tí grundgeving, at kvinnuligi dómarin er alt ov liberal. Tað at uttasta høgra í USA ikki dámar hetta so týðandi valið hjá Obama boðar eftir okkara tykki bara frá góðum. Tí tað staðfestir, at Obama hevur tikið eina rætta avgerð. Vit hava tíverri sæð eina óhepna og syrgiliga gongd í vali av dómarum til Hægstarætt undir teimum báðum Bushdynastiunum, har alt varð gjørt fyri at velja høgravendar dómarar í Hægstarætt. Hesir dómarar verða valdir fyri lívið, og tí er tað ein ósigur fyri øll tey, sum vilja frælsi, humanismu, demokrati og javnrættindi, tá høgravendir forsetar sleppa at velja nýggjar limir í Hægstarætt. Tað fáa vit so einki gjørt við, og tí er tað sera avgerandi fyri fólkaræði í USA, at forseti sum Obama sleppur at velja nýggj fólk í Hægstarætt.

Tilsamans eru níggju dómarar í Hægstarætti og av teimum er bert ein kvinna. Nú verða so tvær kvinnur. Valið skal góðkennast av Senatinum, og mong dømi eru um, at Senatið hevur kolldømt uppskot frá forsetanum. Neyvan fer tað at eydnast at koppa valinum av Sonja Sotomayor, sum er uppvaksin millum tey fátøku í New York. Pápin doyði, tá hon bert var 9 ára gomul og er hon enn ein ímynd av amerikanska dreyminum, at tað ber til at koma sær langt fram, hóast tú hevur havt ein torføran uppvøkstur og ikki er av ríkum foreldrum. Sonja Sotomayor, sum er skild, hevur klárað seg sera væl í útbúgvingarskipanini og sum dómari. Hon verður mett sera klók og skilagóð. Hon hevur í samrøðu sagt seg hava til uppgávu at umboða tey, sum ongan góðan hava ella sum hava verið fyri órættvísi. Rættvísi skal galda fyri øll bæði, tá talan er um lógar- og búskaparligt rættvísi. Hon verður mett sum ein dómari við eini pragmatiskar útlegging og meting av lógini. Tey høgravendu finnast at henni fyri at vera ov bleyt, tá tað snýr seg um revsing og ov harða, tá tað snýr seg um løgregluna.

Vit kunnu bara fegnast um, at USA hevur fingið ein forseta, hvørs fingramerki síggjast aftur í øllum samfelagnum, og ikki minst tá talan er um at minka um valdið hjá teimum konservativu og høgravendu við at velja meira liberalar dómarar í Hægstarætt. Gott í teg Obama.

**Sosialurin**

## Vit eru til reiðar at gera neyðugar semjur

SJÚRÐUR SKAALE



**Sum útlitini eru, fara vit ikki at taka partapolitiskan vinning fram um tær semjur, sum samfelagnum tørvar**

Leiðslan í samgonguni er farnu vikurnar komin við hesum fráboðanum:

Tingið skal kallast saman í juni at viðgerða djúptøkin átøk í sambandi við búskaparkreppuna.

Breiðar semjur skulu gerast á tingi um tey inntriv, sum fremjast skulu.

Málið er at fíggjarlógin skal javnviga um 3 til 5 ár.

Føroyar skulu vera við í teirri veðurlagsavtalu, sum væntandi verður gjørd í Keypmannahavn í vetur. (Hetta merkir, at oljunýtslan í Føroyum skal minkast við út ímóti eini helvt!).

Til tess at røkka hesum málum skulu "heilagar kýr slaktast", "kamelar slúkast" og møguliga skal okkurt slag av "undantaksstøðu" setast í gildi.

Hetta eru ikki hissini útmeldingar.

Men samstundis má ein staðfesta, at politikkurin hjá samgonguni ikki á nakran hátt er í samsvari við hennara egnu fráboðanir.

At nartla burturav veitingunum til samfelagsins veikastu bólkar, kann illa kallast politikkur yvirhøvur.

Sama kann sigast um ein íløgupolitikk, sum sjálvt samgongulimir siga vera óreallistiskan.

Tí má kravið verða, at tá tingið verður kallað saman í juni, fer landsstýrið at leggja fram ein politikk, sum kann gera, at samsvar verður millum orð og gerð.

Í Tjóðveldinum vænta vit eisini at verða boðin til opnar samráðingar um henda politikk, áðrenn tingið verður kallað saman.

Og fáa vit ávirkan, eru vit sinnað at taka ópopuler, men neyðug tøk - hóast vit sita í andstøðu.

Sum útlitini eru, fara vit ikki at taka partapolitiskan vinning fram um tær semjur, sum samfelagnum tørvar. Tí hava vit eisini boðað frá eini røð av neyðugum inntrivum, sum vit eru sinnað at leggja rygg til.

Men fyrsta stigið má vera, at landsstýrið kallar inn til tær lovaðu samráðingarnar, soleiðis at tingið í juni kann leggja kreppupolitikkin í fastar karmar. At lata alt samfelagið bíða longur eftir politisku skipanini, er ikki ráðiligt.

Ella er tað veruliga so galið, at landsstýrisins bombastisku fráboðanir ikki eru annað enn... bombastiskar fráboðanir? At eingin politikkur finst yvirhøvur?

## Plantið eitt træ, føroyingar!!

EYÐUN Á BORG



Á Borg á Argjum í gýtusól 2009

**Planta 100 trø í miðbýnum, Tórshavnar kommuna!! Stuðlið træplanting nógv meir, landsins myndugleikar!!**

Okkara træfátæka land hevur brúk fyri trøum, nógvum trøum! Tey lívga, fjálga, fríðka, reinsa!

ÍSLAND: Íslendingar hava gjørt sera nógv við træplanting. Seinastu árini hava teir plantað fleiri milliónir trø um árið.

Skulu vit samanbera okkum við Ísland, eg hugsi bæði um landastødd og fólkatal, so áttu vit at plantað næstan 150.000 trø um árið! Dugir onkur at siga, hvussu nógv trø, vit munnu planta í Føroyum árliga?

JÓLAÓDNIN 1988: Meir enn 20 ár eru liðin, síðan jólaódnin herjaði í Føroyum. Hví mundi tað ganga so seint at rudda og planta í viðarlundunum? Orsøkin man vera, at alt ov lítil fíggjarstuðul verður latin til træplanting/skógrøkt!

TÓRSHAVNAR KOMMUNA 100 ÁR: Hugskot til Tórshavnar kommunu: Planta 100 trø í miðbýnum, nú Tórshavnar kommuna fyllir 100 ár sum fólkavald kommuna! Eg undrist annars á, at eitt træ varð avkvett beint við býráðssalin, at einki nýtt træ er plantað beint norðan fyri býráðsbygningin (gróthúsið), at einki træ er plantað aftur við "Keypsuna" í miðbýnum o.s.fr. !?!

Hugaligt at síggja øll trøini fram við vegnum í miðbýnum í Reykjavík. Kundi okkurt tílíkt ikki verðið gjørt í Havn? Millum hasi jørnini í gongugøtuni, t.d.!?

HAVNARÁ Í DAGSINS LJÓS!?: Nú líður so væl at reinsa áirnar í Havn. Tøkk fái Kommunan fyri tað! Er tað ikki gylt høvi at byrja ætlaðu uppafturlatingina av Havnará, nú Tórshavnar kommuna fyllir 100 ár?! Og hvussu við Áarstovu?

E.S.: Tøkk til foreldrini hjá 7.b fyri gott træplantingarsamstarv! Eisini ein kvøða til gullsmiðin!

Við træplantingarkvøðu

### Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.